# Samferðslumálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 6. februar 2019 |
| Mál nr.: | S6800-026/18 |
| Málsviðgjørt: | arø |

**Fylgiskjal 1**

**Javntekstur**

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

| Galdandi orðingar | Løgtingslógaruppskotið |
|---|---|
| | **§ 1**<br><br>Í løgtingslóg nr. 48 frá 3. apríl 2001 um barsilsskipan (Barsilslógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 166 frá 20. desember 2017, verða gjørdar hesar broytingar: |
| **§ 1.** ...<br>*Stk. 2.* Eftir barnsburð hevur móðirin rætt til barsilsfarloyvi í 14 vikur. Faðirin hevur rætt til barsilsfarloyvi í 4 vikur innan fyri tær fyrstu 52 vikurnar eftir barnsburð sbr. tó § 9, stk. 7.<br><br>*Stk. 3.* ...<br><br>*Stk. 4.* Hóast ásetingina í stk. 3 hava foreldrini rætt til barsilsfarloyvi samstundis í 4 vikur innan fyri tær fyrstu 52 vikurnar eftir barnsburð.<br><br>*Stk. 5-7.* ... | **1.** Í § 1, stk. 2, 2. pkt. verður “4 vikur” broytt til: “ 5 vikur”.<br><br><br><br><br><br><br>**2.** Í § 1, stk. 4 verður “4 vikur” broytt til: “5 vikur”. |
| **§ 2.** ...<br>*Stk. 2.* ... | |

| | |
|---|---|
| *Stk. 3.* Rættin til barsilsfarloyvi eftir stk. 1 kann bara annað av foreldrunum nýta í senn. Hóast ásetingina í 1. pkt. hava foreldrini rætt til barsilsfarloyvi samstundis í 4 vikur innan fyri tær fyrstu 52-56 vikurnar eftir, at foreldrini hava fingið barnið. Uttan mun til ásetingina í 1. pkt., hava foreldrini, í sambandi við, at tey fara eftir barninum, rætt til barsilsfarloyvi samstundis í upp til 4 vikur áðrenn, tey fáa barnið. Rætturin til barsilsfarloyvi hetta tíðarskeið er treytaður av, at viðkomandi er staddur uttanlands eftir barninum. | **3.** Í § 2, stk. 3, 2. pkt. verður "4 vikur" broytt til: "5 vikur", og "52-56 vikurnar" verður broytt til: "56 vikurnar". |
| **§ 9.** Kvinna, sum hevur A-inntøku, og sum fer frá arbeiði orsakað av viðgongu ella barnsburði, hevur rætt til barsilspening frá tí degi, mett verður, at 4 vikur eru eftir til barnsburð, ella frá tí løtu, hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur og/ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum, tó í fyrsta lagi frá tí degi, mett verður, at 8 vikur eru eftir til barnsburð. Eftir barnsburð hevur kvinna rætt til barsilspening í 42 vikur innan fyrstu 46 vikurnar eftir barsnburð.<br>*Stk. 2.* Foreldrini kunnu í staðin velja, at faðirin at barninum skal vera heima hjá barninum í upp til 28 vikur, sbr. tó stk. 6 og 7, eftir 14. viku eftir barnsburð og harvið fáa barsilspening í hesum tíðarskeiði. Treytin fyri, at faðir at barni kann fá barsilspening í hesum tíðarskeiðinum, er at móðirin ikki samstundis er frá arbeiði við løn ella hevur søkt um barsilspening frá barsilsskipanini fyri hetta tíðarskeið.<br>*Stk. 3.* Faðirin at barninum hevur rætt til barsilspening í 4 vikur innan fyri tær fyrstu 46 vikurnar eftir barnsburð.<br>*Stk. 4.* Hóast ásetingingarnar í stk. 2 og 3, hevur faðirin rætt til barsilspening í upp til og innan fyri 46 vikur eftir barnsburð, um mamman doyr, ella læknaváttan staðfestir, at mamman vegna álvarliga sjúku ikki er før fyri at taka sær av barninum. Treytin fyri, at faðir at barni kann fáa barsilspening í hesum tíðarskeiðnum, er, at mamman ikki nýtir rætt sín at fáa barsilspening frá barsilsskipanini ávísa tíðarskeiðið. | **4.** Í § 9, stk. 1, 2. pkt. verður "42 vikur" broytt til: "43 vikur" og "46 vikurnar" broytt til: "52 vikurnar".<br>**5.** Í § 9, stk. 2 verður "28 vikur" broytt til: "29 vikur".<br>**6.** Í § 9, stk. 3 verður "4 vikur" broytt til: "5 vikur" og "46 vikurnar" broytt til: "52 vikurnar".<br>**7.** § 9, stk. 4, 1. pkt. verður orðað soleiðis: "Hóast ásetingarnar í stk. 2 og 3 hevur faðirin rætt til barsilspening í upp til 48 vikur innan fyri 52 vikur eftir barnsburð, um mamman doyr, ella læknaváttan staðfestir, at mamman vegna álvarliga sjúku ikki er før fyri at taka sær av barninum." |

| | |
|---|---|
| *Stk. 5.* ...<br>*Stk. 6.* Fáa foreldrini 2 børn ella fleiri undir sama barnsburði, verða 4 vikur lagdar afturat teimum 28 vikunum, sum foreldrini kunnu býta sínámillum, sbrt. stk. 2.<br>*Stk. 7.* Verður barn ella børn fødd áðrenn 32. viku í viðgonguni, verða 8 vikur lagdar afturat teimum 28 vikunum, sum foreldrini kunnu býta sínámillum, sbrt. stk. 2.<br>*Stk. 8.* ... | **8.** § 9, stk. 6 og 7 verður "28 vikunum" broytt til: "29 vikunum". |
| **§ 10.** Foreldur, ið eru løntakarar og ættleiða barn, hava rætt til barsilspening í tilsamans 50 vikur eftir, at tey hava fingið barnið, og upp til 4 vikur, áðrenn tey hava fingið barnið.<br>*Stk. 2.* ...<br>*Stk. 3.* Rættin til barsilspening eftir stk. 1 kann bara annað av foreldrunum nýta í senn. Hóast ásetingina í 1. pkt. hava foreldrini rætt til barsilspening samstundis í 4 vikur innan fyri tær fyrstu 46-50 vikurnar eftir, at foreldrini hava fingið barnið. Uttan mun til ásetingina í 1. pkt., hava foreldrini, í sambandi við, at tey fara eftir barninum, rætt til barsilspening samstundis í upp til 4 vikur áðrenn, tey fáa barnið. Rætturin til barsilspening hetta tíðarskeið er treytaður av, at viðkomandi er staddur uttanlands eftir barninum.<br>*Stk. 4.* ... | **9.** Í § 10, stk. 1 verður "50 vikur" broytt til: "52 vikur".<br><br>**10.** Í § 10, stk. 3, 2. pkt. verður "4 vikur" broytt til: "5 vikur" og "46-50 vikurnar" broytt til: "56 vikurnar". |
| | **§ 2**<br><br>*Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. juni 2019.<br>*Stk. 2.* Hendan løgtingslóg er galdandi fyri foreldur at børnum, fødd ella ættleidd sama dag, sum henda løgtingslóg kemur í gildi, ella seinni, og fyri tey foreldur, sum eru í skipanini, og sum fáa útgjald eftir §§ 9 ella 10. Løgtingslógin er eisini galdandi fyri tey foreldur, hvørs útgjaldstíðarskeið eftir §§ 9 ella 10 er endað, men har seinasta útgjaldið úr Barsilsskipanini ikki er útgoldið. |